# Studentar stilla upp

**Miðnámsflokkurin verður helst heitið á nýggja politiska flokkinum, sum stillar upp til løgtingsvalið. Stigtakarar eru næmingar í Hoydølum**

POLITIKKUR
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

- Nú hava politikkararnir tosa nóg nógv, og onki er komið burturúr. Tí taka vit málið í egnar hendur og stilla upp, sigur ein avgjørdur samfelagsnæmingur úr 3.g. Rani á Borg Eyðunsson.

Ein flokkur, sum hevur samfelagsfak á hástigi í Hoydølum, hevur tikið stig til at seta á stovn nýggjan politiskan flokk, sum helst kemur at eita Miðnámsflokkurin. Endamálið við flokkinum er at bøta um viðurskiftini hjá lesandi í Føroyum, eitt nú í mun studning og hølisviðurskifti.

Tá Sosialurin hittir nøkur av umboðunum fyri nýggja flokkin í forhøllini í studentaskúlanum í Hoydølum, verður eitt sindur skemtandi tikið til, at vit annaðhvørt kunnu seta okkum inn í vaskirúmið ella út á vesið at práta. Men vit enda kortini inni hjá lestrarvegleiðarunum, har vit eru um at detta um eitt løgið bump mitt á gólvinum.

### Varpa ljós á umstøðurnar

Tey seks ungu eru bæði hugagóð og tíðindafróð at práta við, og vísa til talsmann teirra, Berg Johannesen.

- Vit ætla at varpa ljós á umstøðurnar hjá lesandi í Føroyum. Harímillum vilja vit hava eina loysn á málinum um studentaskúlan í Hoydølum, sigur Bergur Johannesen, sum í og fyri seg ikki hevur nakra avgjørda meining um, hvørs skúlin skal byggjast av nýggjum í Hoydølum, aðrastaðni í býnum ella vera partur av skúladeplinum í Marknagili.

Higartil hava næmingarnir í flokkinum savnað einar 500 undirskriftir av teimum 800 sum skulu til, fyri at stilla upp. Og øll formlig krøv eru komin í rættlag við myndugleikarnar. Næmingarnir, sum ganga í øðrum av teimum báðum samfelagsflokkunum á hástigi í Hoydølum, hava gjørt av at stilla eitt valevni upp í fyrsta umfari, Berg Johannesen.

- Men vit vóna at næmingar úr øðrum flokkum og skúlum koma upp á listan eisini, um tey hava hug til tað, siga tey.

### Valstríð á netinum

Bakgrundin fyri at stilla upp til løgtingsvalið er at finna í einari verkætlanaruppgávu, sum flokkurin fekk frá læraranum Sámal Matras Kristiansen, um at gera ein politiskan flokk. Burtursæð frá at vegleiða næmingunum, hevur hann onki við sjálvt valprogrammið ella valstríðið at gera.

Spurd, hvussu tey ætla at reka valstríð, greiða tey frá, at flokkurin fær eina heimasíðu, og verður at eisini at finna á My Space, www.myspace.com/listiL.

- Vit tosa sama mál og kenna ynskini hjá málbólkinum, og tí verður tað eisini nógv munn til munn metodan sum verður brúkt, sigur Rani á Borg Eyðunnson.

Eisini ætla tey at skipa fyri onkrum valfundi, umframt eitt sindur av ókeypis reklamu her í fyrstanni frá miðlunum, sum tosa við tey.

Nýggi flokkurin fær stavin L, eftir at síðsti flokkurin, sum var uppstillaður var K, Hin Stuttligi Flokkurin.

- Verið eg valdur, fari eg helst í farloyvi úr skúlanum, ella eg geri meg lidnan sum sjálvlesandi, sigur Bergur Johannesen, sum verður 19 ár, tá valið verður í januar.



*Bergur Johannesen, Ranvá Poulsen, Sarah Ann Thomsen, Herdis Müller, Unn Øssursdóttir og Rani á Borg Eyðunsson uttanfyri studentaskúlan í Hoydølum.*

# Studentaskúlin má bíða

**Ongar broytingar verða í Hoydølum undan valginum, men Jógvan á Lakjuni sigur, at fær hann ávirkan á komandi samgongusamráðingar, fer hann at krevja eina loysn í samgonguskjalið**

SKÚLAMÁL
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Ruðuleikin um studentaskúlan í Hoydølum er eitt typiskt dømi um eitt mál, sum nú gevur at bíta, tí semja ikki fekst um eina loysn í samgonguni. Tíðin er um at renna undan, valgið er í nánd, og landsstýrismaðurin sigur seg hvørji kunna ella vilja skera ígjøgnum í mun til samstarvsfelagar sínar. Tí er púra greitt, at ongin loyns verður á málinum hesumegin valið, og verður tað tí upp til eina komandi samgongu at finna eina varandi loysn.

Eldurin í gentukostdeildini beint fyri summarfrítíðina gjørdist eisini startskotið til drúgva orðaskiftið um umstøðurnar í Hoydølum sum so. Nakrar av avleiðingunum av brandinum vóru, at næmingar sleppa ikki at parkera við skúlan, at frálæran í tónleiki og list varð flutt í onnur høli, og at næmingar, sum vóru fluttir inn á kostdeildina í læknahúsinum omanfyri skúlan, vórðu settir á gøtuna vegna vantandi brunatrygd.

Síðani er mangt farið fram í málinum. Síðst høvdu næmingar verkætlan um miðnámsskúlan, og hevði hetta millum annað við sær eina kravgongu í røttum hálvfjersarastíli, við hartil hoyrandi miðlaumrøðu. Eisini hava fleiri starvsfólk skúlans verið frammi, og onkur fór enntá so vítt sum at siga, at hølisviðurskoftini eru lívshættislig.

### Næmingar ella starvsfólk

Hetta hevði so aftur við sær, at Arbeiðseftirlitið tók stig til at kanna, um tað veruliga er soleiðis, at skúlin er lívshættisligur. Nú niðurstøðurnar frá kanningini eru almannakunngjørdar sæst, at fólk eru ikki í lívsvanda. Men í frágreiðingini er eitt, sum gongur aftur: Umstøðurnar eru somikið vánaligar á vesinum og í umklæðingarrúminum, at var talan um arbeiðsumhvørvið hjá starvsfólkunum, so var virksemið á skúlanum ikki góðkent. Men av tí, at skúlanæmingar eru ikki fevndir av lógini um arbeiðseftirlit, og ongin hevur átrygd av, at teirra arbeiðsumstøður eru nøktandi, ber ikki til at krevja nakað, og kann virksemið í veruleikanum halda fram líka til nevndu høli detta sundur av sær sjálvum.

### Visti av ongum

Jógvan Á Lakjuni, ið sum landsstýrismaður við skúlamálum varðar av trivnaðinum hjá skúlanæmingum, sigur seg ongantíð hava verið kunnaðan um, at næmingar eru ikki umfataðir av reglunum um arbeiðsumhvørvi.

- Hetta mugu vit gera nakað við, tí tað ljóðar bæði ólogiskt og løgið, at ongin trygd er fyri skúlanæmingar, eitt nú í sambandi við vesi- og umklæðingarviðurskifti ni, sigur landsstýrismaðurin við Sosialin.

Spurdur, hvørja viðmerking hann hevur til, at arbeiðseftirlitið ikki metir undirvísingarhølini vera egnað til fleiri enn tíggju næmingar, í mun til verandi 26, sigur Jógvan á Lakjuni, at undirvísingarhølini verða ikki størri ella betri dag frá degi.

- Eg havi alla tíðina sagt, at skúlin í Hoydølum átti at verið partur av miðnámsskúladeplinum í Marknagili, men tað hevur ikki eydnast at finna eina semju innanhýsis í samgonguni í hesum málinum. Og nú so stutt er eftir til valið, vil eg ikki lova nakað, men vísa til, at hetta helst verður eitt av fremstu málunum hjá einum komandi landsstýrið at taka sær av, sigur Jógvan á Lakjuni.

### Ein perla á bleytum lendi

Eisini vísir hann á, at fyrst í desember fær ráðið eina frágreiðing frá Teknologisk Institut, har greitt verður frá um standin á hølunum.

- Uttan at vita tað við vissu, vænti eg, at niðurstøðan av kanningini verður, at skúlin er óegnaður. Skúlin í Hoydølum er ein perla, men lendið er so bleytt, at eg rokni við, at mælt verður til at byggja aðrastaðni, sigur Jógvan á Lakjuni. Landsstýrismaðurin sigur seg vera spentan til kanningina frá Teknologisk Institutt, tí kanska duga tey at síggja møguleikar fyri at seta skúlan í stand og nýta hann til annað endamál.

### Fer at krevja loysn

Men samstundis bendir nógv á, at verandi samgonga hevur í hyggju at halda fram eftir valgið, og tískil noyðist at finna eina loysn. Hvat sigur landsstýrismaðurin til hetta?

- Nú er tað ikki vist, at eg verið valdur aftur, ella at verandi landstýrið verður sitandi. Men fái eg nakra ávirkan á komandi samgongusamráðingar, fari eg at seta fram krav um eina loysn fyri Føroya Studentaskúla, sigur Jógvan á Lakjuni, sum eisini vísir á, at landsstýrið hevur sett nógvar milliónir av til viðlíkahald av skúlanum, og annars at raðfesta aðrar skúlar á miðnámsskúlaøkinum.

Óansæð hvat hendir ella ikki hendir, so er eitt vist: Ongin loysn er í eygsjón fyri gamla studentaskúlan í Hoydølum, og eftir valgið kunnu tey, sum varða av, byrja av nýggjum aftur, og møguliga ber tá til at koma fram til eina semju.